# Tycho Brahe fær fast tilhald á oynni Ven í Oyrarsundi



**Altjóða stjørnufrøðiár 10**

**Pól Jespersen**

**Tycho Brahe ger neyvar gongustjørnumálingar á Ven. Hetta er, áðrenn kikarin er uppfunnin. Málingarnar fáa seinni avgerandi týdning, tá ið finnast skal fram til veruligu rásirnar hjá gongustjørnunum**

Í 1565 verður Tycho kallaður heim úr Leipzig. Sama árið doyr fosturfaðirin av lungnabruna, eftir at hann hevur bjargað konginum, Fríðriki II, tá ið hann - helst í fyllskapi - datt á sjógv av hesti sínum. Eftir deyða fosturfaðirsins hevur Tycho lítið samband við ættina. Tey skilja ikki áhuga hansara fyri stjørnufrøðini. Eitt undantak er tó, mammubeiggin Steen Bille.

Næstu árini er Tycho á lærdómssetrum í Evropa. Hann er fyrst í Wittenberg, og í Rostock lesur hann stjørnufrøði, støddfrøði og læknafrøði. Har kemur hann til ilnar við danska aðalsmannin Parsberg. Í einum kirkjugarði draga teir korðurnar og Tycho missir eitt petti av nasarygginum.

Í Augsburg skipar hann fyri at gera ein stóran kvadrant; bogin er 5 metrar í radius. Eisini ger hann ein stóran himmalglobus, hálvanannan metur í tvørmáli, sum hann síðan altíð hevur hjá sær. Í hann merkir hann stjørnurnar, so hvørt sum hann hevur funnið knattstøðuna á himmalhválvinum.

Í 1570 er Tycho aftur heima, tí faðirin Otte liggur fyri deyðanum. 24 ára gamal veit hann nú tað, sum vert er at vita um stjørnufrøði og hevur fingið gott samband við fólk við somu áhugamálum um alt Evropa.

Í 1571 doyr pápin, og Tycho flytur inn til mammubeiggjan Steen Bille. Steen rekur eitt glasverk og eina pappírsmyllu. Tycho gongur honum til handa og fæst eisini við evnafrøði, ella kanska rættari alkymi. Tað tykist, sum er stjørnufrøðin ikki longur so frammarlaga í huganum, men tað broytist aftur 11. november í 1572.

## De nova stella

Tá sæst ein "nýggj stjørna" í stjørnumyndini Cassiopeiu. Um hetta skrivaði Tycho soleiðis: "Om aftenen efter solnedgang, da jeg af gammel vane betragtede stjernerne på den klare himmel, opdagede jeg, at en ny og usædvanlig stjerne, overlegen alle andre i glans, lyste lige over hovedet på mig, og eftersom jeg lige siden min barndom har kendt alle himlens stjerner (det er ikke vanskeligt at lære dem at kende), stod det klart for mig, at der aldrig før havde været nogen stjerne på dette sted, ikke engang en svag og da slet ikke en så lysstærk og fremtrædende som denne.





**Mynd úr bókini "De Nova Stella". Strikur eru teknaðar í myndina at vísa Cassiopeiu (Mariurokk), sum hevur skap sum eitt W.**

Jeg blev så forbavset ved dette syn, at jeg ikke skammede mig over at tvivle på det, jeg så". Og seinni skrivar hann: "Det var i sandhed et mirakel, enten det største, som nogen sinde er indtruffet i naturen, eller også et, som de hellige profeter bevidnede".

Orsøkin, at Tycho gjørdist so skakkur av hesi hending, var, at hann eins og øll onnur tá á døgum helt stjørnuhimmalin vera óbroytiligan. Nú hevði hann prógv fyri, at so var ikki. Hann skrivaði eina bók um hendingina. Bókin "De Nova Stella" gjørdi Tycho heimskendan. Heitið var óheppið, men tað kundi Tycho Brahe ikki vita, tí hetta var ikki nýggj stjørna, men spreingistjørna (supernova), t.e. stjørna, sum endaði sínar dagar í einari sterkari spreinging og tí lýsti ógvuliga bjart í nakrar mánaðir. Tað vita vit nú. Bókin hjá Tycho snýr seg ikki bara um nýggju stjørnuna. Til dømis ger hann greitt, hvussu lítið hann heldur um innantóma lívið, danski aðalin livir.

Í 1572 hittir Tycho konu sína, Kirstine Babara Jørgensdatter. Hon er ikki av aðalsætt, og tey verða ikki kirkjuvígd. Tey halda saman alt lívið og fáa 9 børn.

## Ven

Tycho er illa lýddur í heimlandinum, og samstundis eru boð eftir honum fleiri staðir í Evropa. Í 1574-75 heldur hann fyrilestrar á Københavns Universiteti og fer so út í Evropa at finna sær hóskandi tilhald til sína gransking. Danskir myndugleikar skilja nú, at skal landið ikki missa Tycho, má okkurt verða gjørt. Ymisk





**Stóri veggjakvadranturin á Ven. Mynd av Tycho og tólum prýðir veggin. Ein maður siktar og lesur stjørnuhæddina, ein lesur klokkutíðina, og ein triði skrivar úrslitið niður.**

tilboð verða løgd fyri hann, men hann er ikki nøgdur. So bjóðar Fríðrikur II honum oynna Ven; tá tekur hann av, tí her væntar hann at fáa frið at granska. 26. mai í 1576 skrivar kongur undir. Næstu 21 árini er Tycho á Ven og fær, við ongum kikara, til vega ógvuliga virðismikið taltilfar um stjørnur og gongustjørnur. Tilfarið fær seinni avgerandi týdning.